# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 29.10.2018*

**Bygdaráðsfundur: 29.10.2018 kl. 18.00 til kl. 18.50**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Selma Hansen, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 87/2018 Fíggjarætlan 2019 – onnur viðgerð**

J.nr. 00.32.10-S08-3-18

**Mállýsing**

Fyrsta viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2019 var fyri á byrgdaráðsfundi 24.09.2018.

**Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til aðru viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2019, hjá Nes Kommunu, eftir broytingar vera hesi:**

| **Rakstur tkr.** | **2019** | **2018v/eykaj.** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 4.858 | 4.483 | 375 | 8,4 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 16.616 | 15.980 | 636 | 4,0 |
| §3 Børn og ung | 11.215 | 10.890 | 325 | 3,0 |
| §4 Undirvísing | 3.890 | 3.796 | 94 | 2,5 |
| §5 Mentan og frítíð | 3.795 | 3.644 | 151 | 4,1 |
| §6 Teknisk mál | 4.402 | 4.412 | -10 | -0,2 |
| §7 Kommunalt øki | 3.092 | 3.221 | -129 | -4,0 |
| **Rakstur í alt** | **47.868** | **46.426** | **1.442** | **3,1** |
| | | | | |
| **§20 Inntøkur v.m.** | **53.833** | **52.338** | **1.495** | **2,9** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **5.965** | **5.912** | **53** | **0,9** |
| | | | | |
| **Íløgur tkr.** | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 0 | 70 | -70 | -100,0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 141 | 100 | 41 | 41,0 |
| §3 Børn og ung | 5.000 | 1.600 | 3.400 | 212,5 |
| §4 Undirvísing | 50 | 2.500 | -2.450 | -98,0 |
| §5 Mentan og frítíð | 1.800 | 1.710 | 90 | 5,3 |
| §6 Teknisk mál | 6.130 | 7.518 | -1.388 | -18,5 |
| §7 Kommunal virki | 8.600 | 5.630 | 2.970 | 52,8 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Íløgur í alt** | **21.721** | **19.128** | **2.593** | **13,6** |
| **Úrslit aftaná íløgur** | **-15.756** | **-13.216** | **2.540** | **19,2** |
| **Afturgjald av skuld** | **3.910** | **2.910** | **1.000** | **34,4** |
| **Av tøkum peningi** | **1.666** | **9.126** | **-7.460** | **-81,7** |
| **Lántøka** | **18.000** | **7.000** | **11.000** | **157,1** |

**Tilmæli**
Á fundi 29.10.2018 mælir Fíggjarnevndin til, at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður óbroyttur kr. 5.500.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Tilmæli**
Á fundi 29.10.2018 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2019 soleiðis, sum hon er uppsett. Afturgjald av skuld tkr. 3.910 verður fíggjað við rakstraravlopið. Íløgurnar á tkr. 21.721 verða fíggjaðar við rakstraravlopið á tkr. 2.055, tøkum peningi á tkr. 1.666 og lántøku á tkr. 18.000.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 88/2018 Eykajáttan 2018 - Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið – fyrsta viðgerð**
J.nr.14.06.00-Ø09.1.18
**Málslýsing**
Tilbúgvingarnevndin, fyri Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið, hevur á fundi 2. oktober 2018 havt til viðgerðar kostnaðarmeting av liðugtgerð av brandstøðini á Skála.

Ynskiligt er, at rúmini í sunnara enda verða gjørd liðug, og at bygningurin verður málaður uttan. Mettur kostnaður tkr. 700. Hettar merkir, at fíggingin verður soleiðis býtt millum kommunurnar.

| | |
|---|---|
| Nes Kommuna | kr. 143.500 |
| Runavíkar Kommuna | kr. 441.700 |
| Sjóvar Kommuna | kr. 114.800 |
| **Í alt** | **kr. 700.000** |

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 29.10.2018*

**Tilmæli**
Á fundi 23.10.2018 mælir Fíggjarnevndin til, at Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið fær eina eykajáttan á kr. 143.500. Peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Niðurstøða**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 89/2018 Eykajáttan 2018 – Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið**
J.nr.14.05.02-Ø09.1.18
**Málslýsing**
Tilbúgvingarnevndin fyri Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið, hevur á fundi 2. oktober 2018 havt til viðgerðar keyp av nýggjan sløkkiliðsbili til eystara arm á Skálafjørðinum. Núverandi bilur er frá 1988, og soleiðis 30 ára gamal. Tørvur er einum meira nútímans sløkkiliðsbili, sum nøktar tørvin, sum liggur fyri framman.  Avgerandi er, at ein nýggjur bilur stendur tey krøv, sum í dag verða sett til slíkar bilar, og við tí neyðugu stødd til eitt nú tunnilstilbúgving o.a.

Talan er um ein Scania P500 4x4xC við 500 chassi (undirstell á bili) við original CP14 stýrhús. Nýggja modellið 2018.

Kostnaður av bilinum er, tá ið hann stendur á Brandstøðini, 3.4 mió. kr. Ætlandi verður keypið fíggjað soleiðis.

| | |
|---|---|
| Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið | kr. 2.400.000 |
| Eykajáttan frá kommununum | kr. 1.000.000 |

Hettar merkir, at fíggingin verður soleiðis býtt millum kommunurnar:

| | |
|---|---|
| Nes Kommuna | kr. 205.000 |
| Runavíkar Kommuna | kr. 631.000 |
| Sjóvar Kommuna | kr. 164.000 |

**Tilmæli**
Á fundi 23.10.2018 mælir Fíggjarnevndin til, at Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið fær eina eykajáttan á kr. 205.000. Peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Niðurstøða**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 29.10.2018*

**Mál nr. 90/2018 Fíggjarætlan 2019 – Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið**

J.nr.14.00.00-Ø09.1.18

**Málslýsing**

Nevndin fyri Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið hevur á fundi 2. oktober 2018 viðgjørt fíggjarætlanina fyri árið 2019. Nevndin mælir til, at gjaldið frá kommununum til SKS verður eins og undnafarna ár kr. 305,00 pr. íbúgva. Grundarlag fyri íbúgvaratalinum er 01.01.2018.

Íbúgvaratalið í Nes kommunu pr. 01.01.2018 er 1282. Parturin hjá Nes kommunu verður sostatt tkr. 391.

**Tilmæli**

Á fundi 23.10.2018 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini hjá Skálafjarðar Kommunala Sløkkilið fyri 2019 soleiðis, sum fíggjarætlanin er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 92/2018 Medundirskrivari - Skrivarin:**

J.nr.00.22.00-A21.1.18

**Málslýsing**

Bygdaráðið hevur samtykt, at borgarstjórin og skrivarin hava heimild til at undirskriva vegna kommunustýrið. Í sambandi við, at Selma Hansen er sett sum nýggjur skrivari, frá 01.oktober, verður mælt til, at Selma Hansen, skrivari, verður medundirskrivari saman við borgarstjóranum.

**Tilmæli**

Á fundi 23.10.2018 mælir Fíggjarnevndin til, at Selma Hansen verður medundirskrivari saman við borgarstjóranum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 93/2018 Umsókn um byggiloyvi – Laila Pætursdóttir og Jónleif Højgaard**

J.nr. 02.34.02-P20-27-18

**Málslýsing**

Tann 20. september 2018 kom umsókn um byggiloyvi til sethús frá Leilu Pætursdóttir og Jónleif Højgaard. Staðsetingin er niðanfyri vegin á Brekkukletti 26, matr.nr. 415æ Toftir.

**Tilmæli**

Á fundi 11 okt. 2018 mælir Tekniska nevnd til, at Jónleif og Leila fáa byggiloyvi sambært viðløgdu tekningum og frágreiðingum.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 29.10.2018*

**Mál nr. 94/2018 Rammuavtala viðvíkjandi íbúðarbygging á Kneysum**

J.nr. 02.34.02-P20-42-16

**Málslýsing**

Tann 2. oktober 2018 bleiv ein rammuavtala undurskrivað millum Nes kommunu og Bústaðir, har høvuðskarmarnir eru fastlagdir um bygging av 18 íbúðum.

**Tilmælir**

Á fundi 11.10. 2018 mælir Tekniska nevnd til at góðkenna rammuavtaluna.
Á fundi 23.10.2018 tekur Fíggjarnevndin undir við rammuavtaluna, soleiðis sum hon er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 96/2018 Nýggjan lim í bókasavnsnevndina**

J.nr. 00.22.00-A21-2-17

**Málslýsing**

Í skrivi 10.09.2018 takkar Solveig Debess fyri álitið, kommunan hevur sýnt henni, tá ið hon varð vald í bókasavnsnevndina. Hon er flutt av landinum, og heitir á kommununa um at finna ein nýggjan lim til nevndina fyri seg.

**Tilmæli**

Á fundi 29.10.2018 mælir Mentanarnevndin til, at Súni í Hjøllum verður nýggjur nevndarlimur í Bókasavnsnevndini.

**Avgerð**

Tilmælið frá Mentanarnevndina var einmælt samtykt.

**Súni í Hjøllum var úti, meðan málið var viðgjørt**

**Mál nr. 98/2018: Umsókn um stuðul til Sjúklingahotellið Tórshavn í Keypmannahavn**

J.nr. 50.06.00-G01-1-18

**Málslýsing**

Brúkarar av sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn søkja um at fáa fíggjarligan stuðul til uppihaldsrúm á hotellinum. Tey vísa á stóra tørvin á einum góðum uppihaldsrúmi í kjallaranum, har sjúklingarnir kunnu hava møguleika fyri at stytta stundir og brúka síni kreativu evnir.

Kjallararúmið, sum skal gerast í stand, er gott 40 m² til støddar. Saman við umsóknini er yvirlit yvir innbúgv, sum tey kundu hugsa sær bleiv keypt, kostnaður tkr. 70.

**Tilmælir**

Á fundi 11.10.2018 mælir Trivnaðarnevndin til, at Nes kommuna stuðlar við kr. 5.000.

Á fundi 23.10.2018 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini og mælir til, at peningurin verður tikin av konto Stuðul til endamál innan Almanna- og heilsumál.

**Avgerð**
Tilmæli frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Kunning:**

3. **Kvartal av roknskapinum hjá Nes kommunu fyri 2018**

| Rakstur | 3.kv. | Fíggjarætl. | Munur | % |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 3.193 | 4.483 | 1.290 | 28,8% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 11.886 | 15.980 | 4.094 | 25,6% |
| §3 Børn og ung | 7.869 | 10.890 | 3.021 | 27,8% |
| §4 Undirvísing | 2.708 | 3.796 | 1.088 | 28,6% |
| §5 Mentan og frítíð | 2.581 | 3.644 | 1.063 | 29,2% |
| §6 Teknisk mál | 2.945 | 4.412 | 1.467 | 33,3% |
| §7 Kommunal virki | 2.202 | 3.221 | 1.019 | 31,6% |
| **Rakstur í alt** | **33.384** | **46.426** | **13.042** | **28,1%** |
| §20 Inntøkur v.m. | -41.559 | -52.338 | -10.779 | 20,6% |
| **Rakstur pr. 30.09.2018** | **-8.175** | **-5.912** | **2.263** | **-38,3%** |

| Íløgur | 3.kv. | Fíggjarætl. | Munur | % |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 0 | 70 | 70 | 100,0% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 0 | 100 | 100 | 100,0% |
| §3 Børn og ung | 0 | 1.600 | 1.600 | 100,0% |
| §4 Undirvísing | 1.099 | 2.500 | 1.401 | 56,2% |
| §5 Mentan og frítíð | 748 | 1.710 | 962 | 56,2% |
| §6 Teknisk mál | 2.962 | 7.518 | 4.556 | 60,6% |
| §7 Kommunal virki | 500 | 5.630 | 5.130 | 91,1% |
| **Íløgur í alt** | **5.309** | **19.128** | **13.819** | **72,2%** |
| **Íløgur og rakstur í alt** | **-2.866** | **13.216** | **16.082** | **121,7%** |

*Tá lýsta skráin fyri bygdaráðsfundin var liðug viðgjørd, kunnaði borgarstjórin um skriv frá Búnaðarstovuni, sum noktar Nes kommunu at leiga økið á Høganesi. Møguleiki er at kæra avgerðina. Kærufreistin er úti 1.nov. Semja var í bygdaráðnum um, at viðgerða møguleikan fyri at kæra beinanvegin.*

**Mál nr. 99/2018 Byggiætlan - krossur á Høganes**
J.nr. 20.00.00-G01-2-17

**Málslýsing**
Í skrivi 22.02.2018 er komin umsókn um loyvi at nýta økið norðast á Høganesi til tess at seta kross á.

Umsøkjarin hevur sjálvur verið í samskifti við Búnaðarstovuna, og hevur 22.02.2018 fingið at vita, at:

- Tá talan er um almanna gagnligt endamál, er tað viðkomandi kommuna, ið eigur at standa fyri leigumálinum.

Tískil heitir umsøkjarin á Nes kommunu, um at søkja Búnaðarstovuna um leigu av hesum ítøkuliga lendi, norðast á Høganesi. Hetta til tess á seta kross á.

Talan er ikki um eitt byggiloyvi, men umfatar bert leigu av lendið til verkætlanina. Byggiloyvið verður viðgjørt, tá ein ítøkulig verkætlan fyriliggur.

**Tilmælir**
Á fundi 13.03.2018 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan søkir um at leiga lendið til at seta krossin á.

Á fundi 14.03.2018 tekur Mentanarnevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.

Á fundi 16.03.2018 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælunum frá Teknisku nevnd og Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Á bygdaráðsfundinum 03.04.2018 vóru tilmælini frá Teknisku nevnd, Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini einmælt samtykt.

Eftir samskifti við umsøkjarin um økið, m.a. um hvussu stórt leiguøkið skuldi verða, sendi Nes kommuna umsókn til Búnaðarstovuna um leigu av lendi á matr. nr. 267a, til støddar 618 m2.

Búnaðarstovan hevur viðgjørt umsóknina, og hevur í tí sambandinum havt umsóknina til hoyringar hjá festaranum. Í hoyringsskrivinum mælir festarin frá, at umsóknin verður gingin á møti. Kommunan hevur havt høvi til at gera viðmerkingar til hoyringsskrivið, eins og kommunan hevur givið umsøkjaranum møguleika til at gera viðmerkingar til hoyringsskrivið.

4. oktober 2018 kemur skriv frá Búnaðarstovuni, har sagt verður frá, at leiguumsóknin var viðgjørd, og at loyvi at seta kross upp ikki verður gingin á møti.

Grundgevingin til avgerðina hjá Búnaðarstovuni er tann, at umsókta lendi ikki er í tráð við byggisamtyktina. Somuleiðis mælir festarin frá at ganga umsóknini á møti. Eisini hevur málið verið til ummælis hjá kommununi, og hevur kommunan ikki gjørt viðmerkingar til mótmæli hjá festaranum.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 29.10.2018*

Í skrivinum verður sagt frá, at avgerðir hjá Búnaðarstovuni kunnu kærast til Landbúnaðarstevnu við kærurætti til Yvirlandbúnaðarstevnu innan 4 vikur.

Á bygdaráðsfundinum bleiv skrivið frá Búnaðarstovuni viðgjørt og tá støða skuldi takast til, um avgerðin skuldi kærast, bleiv atkvøtt í málinum.

**3 vóru fyri at kæra: Súni í Hjøllum, Petur Jákup Petersen og Kaj Eli Hansen.**
**4 vóru ímóti at kæra: Jóhannus Danielsen, Høgni Hansen, Elin á Torkilsheyggi og Niclas Davidsen.**

**Avgerð er sostatt tikin um ikki at kæra avgerðina hjá Búnaðarstovuni.**